FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 1. juli 2020
J. nr.: 20/00303

Svar upp á fyrispurning nr. 112/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Una Rasmussen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um innkoyringarnar til Norðragøtu

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað fyri at bøta um ferðslutrygdina við innkoyringarnar til Norðragøtu?

Svar:
Á vegastrekkinum millum rundkoyringina í Gøtudali og Gøtugjógv koyra umleið 6.000 bilar dagliga.

Landsverk hevur greinað tær vanlukkur, ið eru skrásettar av løgregluni í tíðarskeiðinum 2014 – 2017. Í hesum tíðarskeiði vóru 11 vanlukkur á hesum teini. Av hesum vanlukkum var ein fólkaskaði, fimm stakvanlukkur og tríggjar vanlukkur í sambandi við vegamótið.

Í 2020 hava verið nakrar krossvanlukkur við Mortansstovubrekku og við Ánna. Sambært kanningum hjá Landsverki bendir einki á, at yvirlitið í vegamótinum var orsøkin til vanlukkurnar. Vegakrossarnir lúka donsk yvirlitskrøv fyri vegamót.

Samanborið við landsveganetið sum heild er vanlukkutættleikin (vanlukkur fyri hvønn km) á fyrrnevnda teini beint yvir miðal. Í 2018 var tí gjørdur ein ferðslulummi á vegamótinum við Mortansstovubrekku.

Landsverk upplýsir, at bilverjan millum Mortansstovubrekku og Gøtugjógv verður skift út ella tikin niður. Orsøkin er, at skráin á bilverjuni hevur lutfalsliga lítið hall, og tí er bilverjan óneyðug á pørtum av hesum teini.

Landsverk kannar við jøvnum millumbilum um fleiri ferðslutrygdartiltøk skula setast í verk við innkoyringarnar til Norðagøtu, herundir um hámarksferðin skal setast niður. Støða verður síðani tikin til úrslitið av hesum kanningum.

Tinganes, 01. juli 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum